

**FAKTA CHRISTIAN NAGATA**

**Aldur:** 42 ár
**Útbúgving:** Cand.merc.aud.
**Familja:** Giftur við Elin Winther Poulsen.
Fýra børn, sum eita Halgir (19 ár),
Eva (12), Marianna (10) og Katrin (4).

*– Eg eri eitt liberalt sinnað menniskja, og eg sakni tann opinleikan og tað tolsemið, sum eyðkennir flestu londini í vesturheiminum, sigur Christian Nagata, stjóri á KT- og samskiftisfyritøkuni NEMA*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

diskusprolaps í rygginum og fekk greið boð um, at hann ongantíð kundi fara til skips. Ein dyggur smeitur fyri fjúrtan ára gamla drongin, sum nú skuldi umstilla seg til okkurt annað.

Hendan umstillingin tók sína tíð, og eftir lokið studentsprógv á studentaskúlanum við Gøtugjógv var hann greiður yvir, at meðaltalið var ov lágt, um hann skuldi lesa víðari. Hann fór at supplera á Handilsskúlanum í Havn fyri at fáa meðaltalið upp, samstundis sum hann fekk arbeiði hjá grannskoðarafyritøkuni Impact hjá Jógvani Sundstein. Og tað var um hetta mundið, at áhugin fyri tí, sum hann livir av í dag, av sonnum kom til sjóndar.

– Tá eg var liðugur á studentaskúlanum, stovnaði eg mína egnu KT-fyritøku, sum seldi teldur, telefaks og aðrar KT-tænastur. Fyritøkan fekk navnið Nagata Data. Áhugin var komin nøkur ár frammanundan, tá babba fekk eina teldu í húsið, sum hugtók meg frá fyrsta degi. Í níggjunda flokki var eg eisini í starvsvenjing hjá Com Data í Klaksvík, og nú hevði eg so hug at royna meg á økinum, minnist Christian aftur.

Dreymurin um lívið á sjónum var skift út við nýggj áhugamál innanfyri eina nýggja vinnu. Ein vinna, sum seinni fór at mynda lívið hjá Christiani.

## Sushi og bankaverðin

Tá Christian flutti til Danmarkar og fór at lesa data og búskap á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn, gjørdust vitjanirnar til Los Angeles fleiri í tali. Umframt lesnaðin arbeiddi hann nærum fulla tíð fyri danska bankan Unibank, sum í dag eitur Nordea. Og hóast tað skuldi eitast at vera eitt lestrarstarv, so gjørdist tann bert 22 ára gamli Christian deildarleiðari á eini deild við tíggju fólkum, hvørs arbeiði var at »spionera aðrar bankar«, sum Christian tekur til.

Í vikuskiftunum hittust føroysk lesandi á kongaliga bókasavninum at lesa, áðrenn leiðin gekk í býin um kvøldið. Og tá hini fóru á McDonald´s at eta, fór Christian einsamallur á kongaliga fiskahandilin á Højbro Plads at eta sushi, sum tá var meiri ókent um okkara leiðir. Men sum fráleið fekk Christian fleiri og fleiri føroyingar við sær á sushi matstovu, og hann heldur fyri við einum smíli, at nýggja sushi matstovan Etika á Áarvegnum í Havn er størsta frambrotið í Føroyum í nýggjari tíð.

– Keypmannahavn var ein deilig tíð, og eg kenni meg framvegis heima í býnum. Grundleggjandi eri eg føroyingur, men eg kenni meg eins nógv heima í Keypmannahavn og í Los Angeles, sigur tann japanski-amerikanski føroyingurin.

## Keypti bumbuflogfør til urframleiðsu

Árini í Keypmannahavn gingu. Christian avgreiddi sítt spesialið og fekk heitið cand.merc.aud., og tá hevði hann hitt konuna Elin Winther Poulsen.

Avgerðin nærkaðist, hvør næsti leikur í lívinum skuldi vera. Føroya Gjaldstova hevði boðið honum starv í Føroyum, men Christian hevði aðrar ætlanir. Mamman hevði byrjað eina lítla fyritøku í Los Angeles, sum framleiddi ur, og tað stóð Christiani í boðið at flyta til Los Angeles at reka fyritøkuna. Hann tók avgerð um at flyta til USA og setti sær sum mál at útbyggja og menna fyritøkuna til altjóða marknaðin.

– Eg hevði sett mær fyri, at eg vildi hava nakrar starvsroyndir uttanlands eftir loknan lestur. Eg hevði sæð so nógv fólk koma av skúlabonki í Danmark og beinleiðis heim í leiðslustørv í Føroyum uttan nakrar arbeiðsroyndir. Tí valdi eg Los Angeles, greiðir Christian frá.

Avgerðin varð tikin um at flyta til USA, og Christian og Elin fóru við tveimum børnum – sum í dag eru vorðin fýra í tali – og átta pappeskjum tvørtur um Atlantshavið.

Christian legði eina langtíðar strategi fyri fyritøkuna. Hann ferðaðist kring knøttin at selja ur til alskyns marglætiskundar, m.a. til sultanin í Oman. Fyritøkan sniðgav og framleiddi eisini serlig ur til amerikanska herin, sum patriotiskir amerikumenn elskaðu. M.a. keypti Christian ein part av einum B52 bumbuflogfari, sum hevur eina serliga tign í amerikanska herinum. Flogfarið varð smeltað um til tilfar, sum fyritøkan kundi framleiða ur fyri, og urið, sum fekk heitið »The Bomber«, gjørdist eitt »brand« í amerikanska herinum.

Christian gjørdi sama nummarið á japanska marknaðinum við einum japanskum flogfari, sum var við til at bumba amerikanska herin í Pearl Harbor á Hawaii í desember 1941, og sum dró USA inn í seinna heimsbardaga.

Og fyritøkan tjenti kassan.

> **Føroyingar hava eina oyðileggjandi trongd til at máta og viga hvønn annan eftir familju, átrúnaði og politiskum sjónarmiðum**

## Politiskt dugnaloysi

– Eg helt ongantíð, at eg skuldi heimaftur til Føroya. Men familjan var flutt heim frammanundan, ferðingin ímillum USA og Føroyar vant uppá seg, og eg byrjaði spakuliga at missa hugin.

Soleiðis sigur Christian um avgerðina at flyta heimaftur á klettarnar. Í 2004 vinkaði hann marglætisurunum í LA farvæl og beyð Føroyum góðan dag eftir fimtan ár í útlegd. Eftir hálvt annað ár sum fíggjarstjóri á Shell gjørdi hann bart og keypti seg inn í Com Data og ReproZ, sum endaði við eini samanlegging av fimm KT- og lýsingarfyritøkum. Nýggja samtakið fekk navnið NEMA, og Christian hevði sett hol á eitt nýtt kapittul í lívinum.

– Onkuntíð spyr man seg sjálvan, hvat man ger í Føroyum, tí eg eri føddur til eitt heitt veðurlag og ein gerandisdag, sum gongur við rúkandi ferð. Og tað er ikki júst tað, sum eyðkennir gerandisdagin her heima, sigur Christian við einum smíli.

Men hvussu upplivir Christian Nagata tað føroyska samfelagið eftir seytjan ár í útlegd? Hann drálar aftur eina løtu og setur seg álvarsamur aftur.

– Nú dámar mær nógv betri at tosa um møguleikar og avbjóðingar heldur enn trupulleikar og forðingar. Men um tú sóknast eftir samfelagskritikki, so haldi eg, at føroyingar hava eina oyðileggjandi trongd til at máta og viga hvønn annan eftir familju, átrúnaði og politiskum sjónarmiðum. Eg eri eitt liberalt sinnað menniskja, og eg sakni tann opinleikan og tað tolsemið, sum eyðkennir flestu londini í vesturheiminum, sigur Christian.

Hann vil ikki tosa um politiskan lit, men hann fylgir væl við og ristir mangan við høvdinum eftir tí, sum fer fram á politiska pallinum. T.d. tá politikararnir siga nei til útlendska arbeiðsmegi, hóast vinnulívið skrálar eftir bæði faklærdum og ófaklærdum útlendingum. Ella tá kjakið um fremmandar bókstavir í stavraðnum fyllir meiri enn áleikandi búskaparkreppan. Ella tá politikararnir forbjóða føroyingum at bryggja sterkt, hóast tað er loyvi at keypa og drekka sterkt. Ella tá vit yvirtaka elligamlar danskar lógir og sleppa síðani endanum, hóast bæði danir og restin av heiminum konstant dagføra og endurnýggja alt lógarverkið. Ella tá politiska skipanin ikki vil taka eitt umfatandi kjak um, hvussu tað kann gerast bíligari at flúgva í og úr Føroyum. Eitt mál, sum sambært Christiani er ein tann størsta forðingin fyri at menna tað føroyska samfelagið og byggja brýr ímillum Føroyum og útheimin.

Men áðrenn hann blívur heilt heitur, hálsar hann um og leggur mær eina við, at hann ikki er typan, sum brýggjar seg um at grenja og kritisera ov nógv. Tað, sum hann ikki fær gjørt nakað við, verður lagt til síðis. Og so konsentrerar hann seg um tað, sum hann sjálvur hevur ávirkan á.

– Eg havi livað eftir eini einfaldari meginreglu, sum hevur myndað mítt lív: Ger tað, sum tú dugir og tímir best. Lívið er ov stutt til nakað annað!

### Men er tað ikki eitt motto, sum bara sterkir borgarar við nógvum møguleikum kunnu hava?

– Jú, kanska. Men soleiðis havi eg hugsað, tá tær stóru avgerðirnar eru tiknar. Og tað er í seinasta enda tað, sum skapar nøgdsemi.